Ár 2008, hin 28. mai kl. 17.30 hevur Klaksvíkar Býráð býráðsfund við niðanfyri standandi fundarskrá.

Allir limir á fundi.
Erik Andreasen møtir fyri Jákup Mikkelsen og Tummas Lervig møtir fyri Eyðgunn Samuelsen

65.
2008-10-012 Umsókn um pláss til bingju – Árnafjørður.
Víst verður til skriv frá umsøkjaranum dagf. 3. apríl 2008. Søkt verður um pláss til eina bingju, sum ætlanin er at umbyggja so hon sær út sum ein skúrur. Ætlanin er at bingjan skal nýtast til skúr og frystarí.
Tekniska Umsiting mælir í skrivi dagf. 7. mai 2008 til, at arbeitt verður við heildarplanlegging av økinum, og at umsøkjarin fær játta lendi av økinum til egningarskúr, og at bygt verður sambært ætlanini í samráð við Teknisku Umsiting.

Havnanevndin tekur, á fundi 13. mai 2008, undir við tilmæli frá Teknisku Umsiting.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt

66.
2008-10-014 Heildarætlan fyri økið við bátahylin í Árnafirði.
Í samband við at søkt verður um at seta bingju við bátahylin í Árnafirði, mælir Tekniska Umsiting í skrivi dagf. 11. apríl 2008 til, at ein heildarplanlegging av økinum verður framd.
Tilmæli frá Teknisku Umsiting dagf. 7. mai 2008 vísir á, hvussu henda ætlan kann fremjast. Ætlanin er, at bingjur ikki skulu standa sjónligar, men at byggjast skulu skýlir, og at hesi skulu líkjast neystabygging. Byggjast skulu tvær eindir í senn.

Havnanevndin tekur, á fundi 13. mai 2008, undir við tilmæli frá Teknisku Umsiting.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt

67.
2008-03-059 Samanbygging millum Looknorth P/F og Dávavirkið.
Víst verður til skriv dagf. 9. apríl 2008, har søkt verður um prinsipielt loyvi til at byggja bygningarnar báðar saman.
Tekniska Umsiting mælir til at geva loyvi.

Havnanevndin tekur á fundi 13. mai 2008 undir við tilmæli frá Teknisku Umsiting dagf. 7. mai 2008.

Tekniska Nevnd tekur á fundi 13. mai 2008 undir við tilmæli frá Teknisku Umsiting dagf. 7. mai 2008.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt

68.
2008-10-003 Uppsetan av skúri við bátahylin á Borðoyavík.
Víst verður til skriv dagf. 10. januar 2008 frá umsøkjaranum, har søkt verður um loyvi til at seta eina 20 fót bingju/skúr við báthylin á Borðoyavík.
Tekniska Umsiting mælir til at játtað umsøkjarnum øki til skúr í øki 2 sum sambært uppskotinum til økisuppdeiling er avsett til skúrar og bátapláss; hetta treyta av at økisuppdeilingin verður góðkend av avvarðandi nevndum/býráðið, og at uppsetanin verður sambært ætlaðu skipanini fyri bingjuskýli/skúrar.

Havnanevndin tekur á fundi 13. mai 2008 undir við tilmæli frá Teknisku Umsiting dagf. 8. mai 2008.05.23

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt

69. Økisuppdeiling við bátahylin á Borðoyavík.
Vísandi til, at fleiri umsóknir eru um økir við bátahylin við Borðoyavík, til bingjur/skúrar og eisini til bygging av bilhúsi og tilhaldsstað til lastbilar, verður her gjørt uppskot til hvussu ymisku økini kunnu nýtast. Sí hjáløgdu tekningar.

Tekniska Umsiting mælir til at góðkenna at arbeitt verður á økinum eftir uppskotnu økisuppdeiling, og at neyðuga uppruddingar- og palaneringsarbeiði verður gjørt.

Havnanevndin tekur á fundi 13. mai 2008 undir við tilmæli frá Teknisku Umsiting dagf. 7. mai 2008.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt

70.
Grannskoðaður ársroknskapur og grannskoðanarprotokoll fyri 2008.
Fíggjarnevndin mælir býráðnum til at samtykkja grannskoðaða ársroknskapin og grannskoðanarprotokollina fyri árið 2007.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt

Fundurin lokin